# Samfelagsgongdin avspeglað í Sparikassanum



*Tað eru góðir dagar hjá Marner Jacobsen og Bjarna Olsen. Teir kunnu vísa á teirra besta úrslit nakrantíð.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Góða gongdin í føroyska samfelagnum og búskapinum verður avspeglað í tí, at Føroya Sparikassi mánadagin kundi vísa á sítt besta úrslit nakrantíð. Føroya Sparikassi tekur í dag munandi størri lut í vinnulívsfígging enn undanfarin ár. Eisini nógvu ómaksgjøldini hava givið eitt gott íkast til ársúrslitið, sum eisini vísta ein minkandi solvens**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heri á Rògvi*

Tað kostaði 104 mió kr. at reka Føroya Sparikassa í 2001. Mánamorgunin var Føroya Sparikassi eisini til reiðar við sínum ársroknskapi fyri 2001, stutt eftir, at Føroya Banki hevði almannakunggjørt sín ársroknskap fyri 2001. Eins og við Føroya Banka vísti ársroknskapurin hjá Føroya Sparikassa ein sera gott úrslit, ið Marner Jacobsen, forstjóri, kallar fyri tað besta úrslitið hjá Føroya Sparikassa nakrantíð. Ársroknskapurin skal bert góðkennast av aðalfundinum hjá Føroya Sparikassa, og hetta verður mest sannlíkt bert ein avgreiðsluspurningur.

Samfelagsgongdin verður avspeglað ársroknskapinum hjá Sparikassanum. Ein roknskapur, sum vísir eitt árslit áljóðandi 73, 829 mió kr., áðrenn skatt. Eftir at skatturin er goldin eru 58,526 ´mió kr. eftir á niðastu linju.

### Meira vinnulív

Sum heild er munandi øðrvísi lesnaður at lesa henda seinasta roknskapin hjá Føroya Sparikassa í mun til teir roknskapir, ið føroyski bankaheimurin hevur víst á áður. Tað gongur sera væl í føroyska samfelagnum við góðum og høgum fiskaprísum, stórari tilflyting umframt tí stóra hákonjukturi, ið vit njóta væl av.

Føroya Sparikassa hevði undir kreppuni rættiliga góð úrslit á vísa á, í mun til aðrar peningastovnar í landinum. Orsøkin til hetta var fyrst og fremst, at Føroya Sparikassin nýtti skynsaman politikk á útlánunum, og Sparikassin lánti so at siga bert út við fyrsta veðrætti, og hetta gav Sparikassanum ein sera stóran fyrimun. Síðani er Føroya Sparikassi eisini komin undir bankalógina og verður eisini umlagdur til partafelag í næstum. Hetta sæst eisini fyri ein part aftur í virkseminum hjá Føroya Sparikassa fyri 2001. Grunnar hjá Føroya Sparikassa eru vorðnir strikaðir, men hesir venda eftir øllum at døma aftur, tá umleggingin til partafelag er liðug.

–Føroya Sparikassi er vorðin meira kommersiellur, og hetta hava vit eisini merkt, men vit koma framvegis at føra sama politikk, sigur Marner Jacobsen, forstjóri.

Lánini til vinnulívið vuksu munandi í farna árið hjá Føroya Sparikassa. Vinnulánini mynda 35,2% av teimum góðu 3,5 milliardunum, ið Føroya Sparikassin kann bókað undir útlán. Teir privatu kundarnir mynda framvegis 65,1% av útlánunum hjá Føroya Sparikassa. Talið av privatum lánum er eisini voksið, men nógvu vinnulívslánini, einamest til alivinnuna, hava givið ein rættiliga markantan vøkstur. Marner Jacobsen legði áherðslu á, at Sparikassin framnvegis hevur álit á alivinnuni, hóast gongdin seinastu tíðina ikki júst hevur verið tann besta.

Av øðrum tølum kunnu nevnast, at Føroya Sparikassi eigur eina ogn áljóðandi 4,94 mia, ið er ein stórur vøkstur upp á yvir 600 mió. Vinningurin fyri hvørja útreiðslukrónu gjørdist 1,58. Føroya Banki kundi sama tíðarskeið vís a á ein vinning upp á 2,55 kr. fyri hvørja kostnaðarkrónu. Gjaldføri Sparikassans var við árslok 934 mió. kr. móti 930 mió. kr. í 2000. Hetta er væl omanfyri lógarkravið. Eisini solvensurin hjá Føroya Sparikassa er væl omanfyri solvenskravið, ið danska fíggjareftirlitið setur. Solvensurin hjá Sparikassanum minkaði tó frá 29,6% til 24,1%. Hetta skyldast, at Sparikassin nú skal taka hædd fyri fleiri risikoum enn áður.

Eitt annað áhugavert er, at inntøkurnar frá ómaksgjøldum eru voksnar við fýra milliónum til góðar 12 mió. Hetta við ómaksgjøldum er nakað, ið kundarnir skulu venja seg við, men Sparikassin hevur samstundis lagt seg eftir at bjóða ókeypis tænastir við heimagreiðslu og øðrum, og Sparikassin hevur eisini lagt til merkis, at fólk nýta meira og meira hetta slagið av tænastum.

Roknað verður við, at gongdin hjá Føroya Sparikassa heldur fram. Stjórarnir í Sparikassanum, Marner Jacobsen og Bjarni Olsen, roknað við einum enn betri úrslitið fyri 2002.



*Munandi størri partur av útlánunum hjá Føroya Sparikassa vórðu í 2001 latin til vinnulívið enn undanfarin ár.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Tyrlan bjargaði bátinum



**– Tað var ein sera djarvur flogskipari á tyrluni. Tað slitnaði fyrru ferð, tá tyrlan royndi at hiva pumpur umborð. Hevði tað ikki eydnast aðru ferð, høvdu vit mist bátin, sigur Magnus Andreasen, skipari á Havnatindi**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:** Klokkan hálvgum níggju sunnumorgunin fekk útróðrarbáturin Havnatindur ein sjógv. Skaðin var stórur, tí sjógvurin stóð upp á hálva maskinuna og hálva last.

Magnus Andreassen, skipari, sigur, at teir vóru staddir átta fjórðingar úr Kalli og Rivtanga, tá teir fingu ein stóran sjógv.

– Vit høvdu júst gjørt av at fara til hús, tá tað hendi, sigur hann.

– Alt dekkið fleyt í sjógvi, bæði pumpurnar og dynamoin vóru undir.

Hurðarnar í maskinrúminum og skúrðinum fóru afturvið. Tað var helst høvuðsorsøkin til, at so nógvur sjógvur kom í bátin, greiðir Magnus frá.

Teir boðaðu Vaktar- og Bjargingartænastuni frá, og Tjaldrið kom á staðið. Tyrlan kom og skuldi hiva pumpur umborð, tí menninir máttu oysa við hond.

– Tað var ein sera djarvur pilotur á tyrluni, tí at umstøðurnar at hiva vóru alt annað enn góðar. Tað slitnaði fyrru ferð, og hevði tað ikki eydnast aðru ferð, so høvdu vit mist bátin, sigur Magnus Andreasen.

– Vit kempaðu allir trígg-ir fyri at halda bátinum flótandi, og tíbetur eydnaðist tað.

Menninir vóru verandi umborð á Havnatindi allatíðina, og um sjey tíðina sunnukvøldið kom Tjaldrið inn á Klaksvík við Havnatindi. Ein sera dramatisk hending, sum tó hevði ein góðan enda.

Havnatindur liggur nú á beding í Klaksvík.



# Altjóða Kvinnubønardagur í Klaksvík

**Í samband við Altjóða Kvinnubønardagin seinasta fríggjadag varð skipað fyri tvørkirkjuligum tiltaki í K.F.U.M & K. í Klaksvik**



*Um 30 kvinnur í øllum aldri vóru savnaðar til bøn hendan dagin í K.F.U.M & K í Klaksvík*

TILTAK
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Endamálið við degnum var at savna kvinnur til bøn, eins væl og peningur varð savnaður inn til vælgerandi endamál.

Altjóða Kvinnubønardagurin er eitt afturvendandi tiltak her á landinum, og í ár vóru 20 ár liðin, síðani hann fyrstu ferð varð hildin í Klaksvík.

### Góð uppmøting

Eini 30 kvinnur vóru við til tiltakið í ár, og vóru hetta kvinnur í øllum aldri og frá ymsum trúarbólkum.

Hesar kvinnur bóðu saman, sungu saman og fingu eisini ein góðan kaffimunn saman.

Á sjálvum tiltakinum varð peningur savnaður inn til vælgerandi endamál, hesuferð til hjálp í Rumenia. Absalon Matras hevur gjørt fleiri túrar til Rumenia, har hann hevur býtt klæðir út millum tey fátæku, og helt hann ein fyrilestur um hesar túrar.

Frá fyrireikarunum frætta vit, at stórur áhugi var fyri hesum fyrilestri, og tá tiltakið var komið at enda, vóru um 2000 krónur savnaðar inn til endamálið.

### Tvørkirkuligt tiltak

Altjóða Kvinnubønardagurin er eitt altjóða, tvørkirkjuligt tiltak, hvørs endamál er at savna kvinnur til bøn fyr teim fátøku kring allan heimin.

Evnið hendan dagin var »Verið Sátt«, sum er tikið úr einum versi í Bíbliuni.



*Gentur úr Betesda og Soli Deo Gloria framførdu sangir, umframt at Absalon Matras helt ein fyrilestur um hansara túrar til Rumenia*



*Kvinnur úr ymsum trúarbólkum skipaðu fyri degnum*